# Syndarlig vanlukka í Saltangará

**Um 22-tíðina hóskvøldið hendi ein syndarlig vanlukka á oljubryggjuni í Saltangará, sum kravdi eitt mannalív. Vanlukkan hendi, tá ið faðir og sonur, sum høvdu fingist við asfaltarbeiði, vóru á veg til hús eftir langan og arbeiðsdag**

VANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Syndarliga vanlukkan hendi, tá ið bilurin fór út av hesum bryggjukantinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað var sonurin, sum koyrdi og á ein ella annan hátt fór bilurin út av suðurendanum av bryggjuni, beint aftanfyri, har Tróndur í Gøtu liggur.

Sjónarvitni vóru á staðnum, og gjáramorgunin hitti Sosialurin ein av monnunum, sum arbeiddi við at vaska Trónd í Gøtu, ið lá við bryggjuna, tá ið vanlukkan hendi. Hann sigur, at tað einasta, hann sá, var í takið á bilinum, tá ið hann fór uppum bryggjukantin. Maðurin heldur, at onnur, ið vóru stødd á bryggjuni hetta kvøldið, sóu betur, hvat hendi.

Tá ið fólk beinanvegin komu út á sjálvan bryggjukantin, sást hvørgin teirra, sum var í bilinum, men lítla løtu eftir, flotnaði pápin.

## Orsøkin ógreið

Kristian Martin Joensen, sýslumaður í Eysturoy, sigur, at enn veit løgreglan ikki, hvør orsøkin var til vanlukkuna, og enn hevur løgreglan ikki havt høvi at tosað við øll sjónarvitnini.

- Bilurin, sum teir báðir koyrdu í, er fingin uppaftur og verður kannaður.

Hann sigur, at lækni kom á staðið, og so skjótt pápin var fingin upp aftur á bryggjuna, varð farið at arbeiða uppá hann.

- Boð vórðu send eftir kavara, sum var skjótur á staðið. Tað tekur sína tíð at koma í kavarabúnan, men tá ið kavarin var farin niður, var hann ógvuliga skjótur uppaftur við tí yngra manninum. Hetta gekk ógvuliga skjótt fyri seg, sigur sýslumaðurin.

## Yngri læt lív

Kristian Martin Joensen sigur, at lívið hjá tí yngra stóð ikki til at bjarga, men seinast, løgreglan frætti fríggjanáttina, var støðan hjá pápanum »stabil«, og tað vónar sýslumaðurin merkir, at hann fer at koma fyri seg aftur.

Faðir og sonur, sum vóru búsitandi á Toftum, vórðu báðir fluttir á Landssjúkrahúsið eftir syndarligu vanlukkuna.

Fríggjamorgunin stutt fyri døgurða frætti Sosialurin frá familjuni, at pápin var vaknaður aftur, og tíbetur bendir alt á, at hann er úr lívsvanda.

Sonurin, sum læt lív í vanlukkuni, var bert 28 ára gamal. Hann hevði fylt 29 ár í dag, 20. desember.




PostScriptPicture
(Lysinggledilig jol\(out\).eps)



# Fótbóltur og dansur í Miðvági

**Miðvágs Bóltfelag skipar triðja jóladag fyri innandura fótbóltskapping í ítróttarhøllini á Giljanesi. Um kvøldið verður dansur í Bygdarhúsinum**

FÓTBÓLTUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Miðvági:**
Miðvágs Bóltfelag koyrir fótbóltarnar á rull triðja jólamorgun klokkan 10.00.

Miðvingar skipa fyri innandura fótbóltskapping fyri lið í øllum aldursbólkum. Kappingin verður leygardagin 27. december, og hon verður bæði fyri gentur og dreingir. Kvinnur og menn.

Tá fótbólturin er liðugur, bjóðar Miðvágs Bóltfelag til dans í bygdarhúsinum í Miðvági. Fyrst til barnadiskotek og síðan til vanliga dans.

Fótboltskappingin er fyri øll, siga tey í MB. Byrjað verður við yngru deildunum klokkan 10.00 leygarmorgunin, og so verður spælt, til liðugt er. Vaksnamannaliðini verða seinast.

Um kvøldið skipar MB fyri dansi í Miðvági. Frá klokkan 19.00 til klokkan 22.00 verður barnadiskotek í Bygdarhúsinum. Og frá klokkan 23.00 spæla ROK til dans.

Fyri at luttaka í fótbóltskappingini er neyðugt við tilmelding. Hon skal vera gjørd í seinasta lagi annan jóladag, tann 26. december, á tlf. 33 32 18 siga tey frá Miðvágs Bóltfelag.



# Jólakonsert í Sandavági

**Vágakórið hevur jólakonsert í Sandavágs Kirkju sunnukvøldið**

JÓLAKONSERT

Vágakórið fer at hava jólakonsert í Sandavágs Kirkju sunnukvøldið klokkan átta.

Sungnir verða, umframt kendar jólasálmar, eisini snagir við løgum eftir bæði Bach og Mozart.

Kórið telur millum 20 og 30 sangarar úr allari oynni. Í vetur er Ólavur Hátún kórleiðari hjá Vágakórinum.

Umframt konsertina í Sandavági sunnukvøldið, fer Vágakórið eisini at syngja í Bíggjar Kirkju undir guðstænastuni á middegi sunnudagin.

**ej**



## Nýggjur stjóri í KPMG



Finnbjørn Zachariasen hevur staðið royndina sum løggildur grannskoðari (Statsaut. revisor). Vit ynskja honum hjartaliga tillukku.

Finnbjørn Zachariasen tekur við sum nýggjur stjóri í felagnum frá 1. januar 2004.

Felagið verður hereftir stjórnað av fýra síðustillaðum stjórum:

Árni Ellefsen
Finnbjørn Zachariasen
Pauli Ellefsen
Súni Schwartz Jacobsen

-allir løggildir grannskoðarar.

KPMG í Føroyum er føroysk fyritøka, ið er limur í altjóða KPMG-kervinum av ráðgevingar- og grannskoðaravirkjum. KPMG í Føroyum grannskoðar, veitir roknskapartænastu og ráðgevur í skatta- og vinnuviðurskiftum. Hjá KPMG í Føroyum starvast 26 fólk. Fýra teirra eru løggildir grannskoðarar (Statsaut. revisorar). Vit arbeiða millum annað fyri einstaklingar, handilsfyritøkur, ídnaðarfyritøkur, kolvetnisfeløg, reiðaravirki, peningastovnar, tryggingarstovnar, kommunur og almennar stovnar.

STARAVEGUR 17 · 100 TÓRSHAVN · TLF. 343434
HEIÐAVEGUR 15 · 600 SALTANGARÁ · TLF. 343454
KPMG